

# Jarðfeingi vertur fyri tveimum ráðstevnum í 2015

Deil:

Jan Müller

29.10.2014 - 21:02

Oljan.fo

Komandi vár fer Jarðfeingi at vera vertur fyri tveimum ráðstevnum. Tann fyrra er 2. Jóannes Rasmussen ráðstevnan, ið verður hildin 5. og 6. mai. Hin seinna ráðstevnan nevnist Drilling Volcanics – a Conference on Drilling in Basaltic Provinces, og hon verður 7. mai. Ráðstevnurnar verða hildnar í samstarvi við Fróðskaparsetur Føroya.
Komandi ár verður Jarðfeingi aftur vertur fyri Jóannes Rasmussen ráðstevnuni. Hetta er onnur ráðstevnan í røðini, tann fyrsta var hildin í 2007. Evnið hesa ferð er eins og seinast “Menning av Basaltumhvørvum”, og ætlanin er at fáa vísindafólk, ið arbeiða við basaltumhvørvum at koma

hendan vegin at skifta orð og hugskot til víðari menning av føroysku jarðfrøðini.
Dagin eftir verður nýggja Drilling Volcanics – a Conference on Drilling in Basaltic Provinces ráðstevnan hildin. Hendan ráðstevnan er ætlað teimum, ið hava áhuga í boring í basaltumhvørvi. Seinastu árini hava fleiri og fleiri boringar verið at sæð í basalti og øðrum vulkanskum tilfari, boringar, ið ofta hava víst seg at vera tekniskt avbjóðandi. Jarðfeingi fer at bjóða fyrilestrarhaldarum úr olju- og veitarafeløgum, ið hava royndir við slíkum boringum, til Føroya at leggja sínar royndir av boringunum fram. Ætlanin er at skapa eitt pláss, har oljufeløg og veitarafeløg við áhuga í hesum boringum fáa høvi at skifta orð og hugskot um, hvussu ein gongd leið kann vera.
Eisini verður skipað fyri tveimum felttúrum, einum undan og einum eftir ráðstevnurnar.
Harumframt verður skipað fyri einum ráðstevnudøgurða.
Ráðstevnurnar eru ein eyðsýndur møguleiki hjá øllum, ið hava í áhuga í stórum basaltumhvørvum, og hvussu hesir verða boraðir stendur at lesa á heimasíðuni hjá Jarðfeingi.

Áhugað kunnu lesa meira við at fara inn á heimasíðuna hjá ráðstevnunumhttp://jrasmussen.jf.fo/

